# Foreldrafundur og fyrilestur

Týskvøldið 5. september verður skipað fyri felags foreldrafundum og fyrilestri í skúlanum.

Skrá.

Kl. 19.00 Foreldrafundur fyri 1.flokki og 2./3. flokki.

Kl. 19.45 **Fyrilestur – Lesið fyri børnum – Gitte Klein**



Seinastu tíðina hevur ljós verið varpað á málsligu menningina hjá børnum. Orsøkin er millum annað, at lærarar rópa varskó, tí alt fleiri børn duga betur enskt og danskt enn móðurmálið. Tað, at duga sítt egna móðurmál, er grundleggjandi, tí málið er miðilin at kunna seta orð á sínar tankar, kenslur og ynski og soleiðis at hava ávirkan á sítt egna lív.

Fyrilesturin er serliga ætlaður øllum foreldrum at børnum í yngru flokkunum t.v.s. Alduni, 1.flokki og 2./3. flokki

Kl. 20.30 Foreldrafundur fyri 4./5. og 6./ 7. flokki.